LM-099/2023

Annika Petersen

Fylgiskjal 81

Fra: Joensen Ella <ella_joensen@hotmail.com>
Sendt: 23. februar 2024 14:51
Til: VMR-Journal
Emne: Hoyringarskriv til uppskot um lóg um burðardygga ferðavinnu

Burðardygg ferðavinna

Vísandi til uppskot um lóg um burðardygga ferðavinnu vil eg hervið koma við viðmerkingum.

Týdningurin av at vit í Føroyum fáa lóggávu á hesum øki er sera stórur. Tað er alneyðugt at vit, við virðing fyri okkara landi og náttúru, fáa skipaði viðurskifti, ið eisini kunnu gagna ferðavinnuni og fólkinum kring landi. Ferðafólkini ynskja jú at vitja okkara land, ið er stórsligið, vakurt, og gjarna óspilt. Men uttan at vit verja okkara náttúru, er skjótt at landið ikki er eins dragandi fyri ferðafólkini og eisini ein syrgilig sjón fyri okkum føroyingar og djórini, ið her liva. Tað er ótrúliga skjótt at niðurbróta náttúruna, og í nógvum førum er ómøguligt at bøta um skaðan, tá ið hann er hendur. Og í veruleikanum er skaðin longu hendur á fleiri økjum í Føroyum. At nýggja lóggávan síðani vil, í stóran mun, føra til at landið verður enn meiri 'opið' fyri øllum, fyri 150kr, og at nærum øll ábyrgdin skal liggja kommunalt, fer als ikki at bøta um nakran skaða. Tískil vil eg hervið gera greitt, at eg taki ikki undir við hesum uppskotinum.

Sum føroyingur og lívfrøðingur havi eg altíð verið vælkomin at fara ein túr í hagan runt alt landið. Eg havi ongantíð upplivað at bøndur hava tala at, men altíð fingið eitt ja, um tó enn onkur túrur hevur verið fluttur, fyri ikki at órógva virkni í haganum ein ávísan dag. Og tað hevur ein so ómetaliga stóran týdning, at virðingin millum føroyingin og bóndalívið og bóndan heldur fram. At bóndin, ið kennir hagan, seyðin, harurnar og fuglin, hevur ræðisrættin í haganum. Tískil vil eg mótmæla, at tað bert í heilt serligum umstøðum skal bera til at 'steingja' økir. Neyðugt verður at geva loyvi til at økir sleppa at hvíla, evt. við avmarkingum av vitjandi, og nógv best var, um man ístaðin valdi at koppa lóggávuni á høvðið, soleiðis at alt í veruleikanum var stongt fyri ferðafólki, men at lokaløkini so valdu at 'opna' ferðavinnuøki/hagar lokalt. Eins og man hevur náttúrulundir í so nógvum øðrum londum. Og so skal tað kunna vera gjørt í samráð millum bøndur, lívfrøðiliga ráðgeving og kommunur, soleiðis at hædd verður tikin fyri lívfrøðiliga váðanum, ávirkanini á náttúruna sum heild, bóndalívið og ferðavinnuna í økinum.
Eitt tað týdningarmesta fyri ferðavinnuna og ferðafólkini er tó sjálvsagt kunning. Og júst hetta er tað, kommunurnar kring landið kunnu skipa saman við eigarum.
Eg eri somuleiðis fyri at bøndur kunnu taka pening frá útlenskum ferðafólki fyri atgongd til øki/haga. Og er kunningin í lagið, so eru ferðafólkini óivað villig til at gjalda fyri 'upplivingina', á sama hátt sum vit gera allastaðni, tá id vit ferðast.

Um so var, at fólk bert fór út í náttúruna góðveðursdagar, tá ið lendi er turt, so bar til at 'avmarkað' slitið á bygdagøtunum. Men tað er ein týðilig og ógvislig burturmáan av lendi á øllum teimum best umtøktu leiðunum (Saksun-Tjørnuvík, út á Kallin, Slættaritindur osv) longu nú. Lendi kemur ikki fyri seg aftur, tá ið so nógv fólk gongur hvønn dag, í alskyns veðrið.

LM-099/2023

Og náttúran lýðir undir hesum. Tískil eri eg fyri at gøtur verða gjørdar (td. sum út á Bøsdalafoss), og á tann hátt ber til at 'avmarka gongið' runt allastaðni og slitið.
Hetta er eisini alneyðugt fyri at verja plantulívið og heiðafuglin, ið kemur til Føroyar at reiðrast um summarið, tá ið ferðafólkatalið er hægst. Tað er ógviliga skjótt at órógvingin ávirkar fuglin, ið síðani við tíðini hvørvur. Tískil má eisini vera møguligt at steingja/avmarka øki fyri at verja fugl (t.d. Í Mykinesi) og seyðin, td undir lembing.

At kommunurnar, skulu gera gøturnar, ið er eitt risa arbeiðið, fyri so lítið av peningi, sum 150kr frá hvørjum ferðafólki er, haldi eg ikki vera í lagið. Hetta kostar milliónaupphæddir, umframt viðlíkahald. Rokningin endar hjá skattgjaldaranum í kommununi, sum í nógvum førum als ikki far nakran vinning av ferðavinnuinntøkunum annars, um ikki matstovur, hotel osv eru í økinum.

Tað er gleðiligt at ynski er um eina burðardygga ferðavinnu, men tað tykist sum uppskotið er beint øvugt týdninginum. Burðardygt merkir jú at lívfrøðiliga tilfeingið ikki skal versna til komandi ættarlið, og tað er júst tað, ið núverandi ferðavinna, og eisini uppskotið, skunda undir. Í allar flestu førum, har ið málið er burðardygd, er ein avmarking sjálvsøgd og ein stór tillaging krevst. Verið tað ein minking í koltvíiltuútláti, minking í nýtslu av rávørum ella skifti til aðrar framferðarhættir, ið minka um árin. Tískil eiga vit at vera varin, við hvussu vit bjóða okkum fram sum ferðavinnuland, ogn og vælsignaðu tit, verjið náttúruna, og okkara vakra land, áðrenn ov seint er.

Vinarliga
Ella Joensen
Lívfrøðingur

Hent Outlook til iOS